FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, 26. mars 2021
J. nr.: 21/00144
Viðgjørt: MM/BAB

Svar upp á fyrispurning nr. 52-106/2020 frá Bjarna Hammer, løgtingsmanni, settur Jørgeni Niclasen, landsstýrismanni í fíggjarmálum, um Fámjinstunnilin

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Hvør er orsøkin til, at verklagslógin um Fámjinstunnilin ikki er løgd fyri Løgtingið, nú framløgufreistin er farin?
2. Nær kann væntast, at verklagslógin um Fámjinstunnilin verður løgd fyri Løgtingið?
3. Nær kann arbeiðið byrja uppá Fámjinstunnilin?

Svar:
Ætlanin hevur verið, at verkætlanin kann bjóðast út áðrenn summarfrítíðina og at arbeiðið kann byrja seinni í ár. Orsøkin til seinkingina er, at avbjóðingar hava verið við jarðfrøðini í sambandi við at finna røttu linjuføringina á tunlinum. Linjuføringin er nú funnin og í løtuni verður arbeitt við at projektera tunnilin. Í fjallinum, har tunnilin skal borast, liggja 40 m høgar fláir frá ístíðini (dysjar), sum á yvirflatuni síggja út til at verða vanligt grót, men sum er leyst tilfar at bora og grava í. Landsverk hevur arbeitt tætt saman við Jarðfeingi fyri at finna bestu og tryggastu loysnina. Tunnilin skal tó væntandi tryggjast betur enn vanligt er fyri líknandi tunlar.

Tinganes, 31. mars 2021

Jørgen Niclasen
landsstýrismaður í fíggjarmálum